# Mondeo og FRV í Kringvarpinum

**Í sendingini Bylgjan hjá Kringvarpinum hesa vikuna vórðu tveir bilar ummældir: Honda FRV og Ford Mondeo - annar ein seks persónabilur og hin ein luksusbilur til fimm**

BILAR

Bilarnir sum vórðu ummældir í sendingini Bylgjan hjá Kringvarpinum mikudagin 10. oktober vóru 6-persónabilurin Honda FRV og Ford Mondeo - annar er ein seks persóna familjubilur og hin er ein 5-persóna luksusbilur.

Fyrri bilurin, sum varð royndarkoyrdur, var ein Honda FRV við 1,8 bensinmotori, 6 girum og 140 hk. Honda FRV er ein praktiskur og rúmligur 6-persónabilur við sera liðiligari innrætting. Bilurin hevur trý sitipláss framman og trý aftan, og øll setrini kunnu flytast aftur og fram óbundin av hvørjum øðrum. Hóast talan er um ein stóran bil hvat plássi viðvíkur, er hann ikki so stórur: 4.29 m langur og 1,81 m breiður.

FRV kann síggjast og roynast hjá Norðbil v. Oyggjarvegin, og bíligasta útgávan kostar 289.750 krónur.

## Ford Mondeo

Seinni bilurin varð ein Ford Mondeo 2.0 Titanium sedan við 5 syl. motori, 6 girum og 220 hk. Talan var um ein luksusbil, sum í byrjunarstøðinum kostar 409.900 krónur, men við allari eykaútgerðini kostar hann yvir hálva millión. Bilurin varð útgjørdur við t.d. Alcantara leðursetrum, navigatión, parkeringssensorum frammanogaftan og Xenonlyktum. Mondeo fæst sum sedan, liftback og stationcar.

Mondeo kann síggjast og roynast hjá P/F Wenzel í Akranesgøtu, og bíligasta útgávan við 1,6 motori (110 hk) kostar 259.800 krónur.

Fróði Løksagarð stóð fyri sendingini, og bilaummælarar vóru Óla Jákup Rólantsson frá Vikublaðnum, Sofus Hansen, bilbyggjari, og Magnus Gunnarsson frá Sosialinum.

**mg**



*Ford Mondeo er ein luksusbilur, sum við allari eykaútgerðini kostar yvir hálva millión*



*Honda FRV er ein praktiskur og rúmligur 6-persónabilur við trimum sitiplássum framman og trimum aftan*

---

**Hvønn dag í oktober mánaða verða Sudoku uppgávur at finna í Sosialinum.**

**Jú fleiri uppgávur, ið tú hevur loyst, tess størri møguleika hevur tú at vinna.**

**Sendið okkum loysnina innan mikudagin 7. november 2007 kl. 10.00 og viðmerkið brævbjálvan »Sudoku«.**

**Vinningur í oktober er 2 M-semiflex flogferðaseðlar við Atlantic Airways. Virði Kr. 6.304,-**

**Drigið verður aðru vikuna í november.**

**Fyri at vera við í kappingini, skal øll uppgávan verða loyst.**



## Vinnarin av september-kappingini:

**Gunvør Eliasen · Hvannasund**

## OKTOBER-KAPPINGIN

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4 | | | | 8 | | 2 | | |
| | | 5 | | | | | | 6 |
| | 3 | | 2 | | | 9 | | |
| 2 | | | | 3 | 7 | | | |
| 7 | | 4 | | | | 8 | | 3 |
| | | | 4 | 6 | | | | 7 |
| | | 9 | | | 4 | | 7 | |
| 5 | | | | | | 1 | | |
| | | 6 | | 1 | | | | 5 |

ATLANTIC AIRWAYS

Navn:____________________

Bústaður:____________________

Telefon:____________________

Sendið til: Sosialin · Boks 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan »Sudoku«

**Vinningurin í oktober**

2 M-semiflex ferðaseðlar frá Atlantic Airways. **Virði Kr. 6.304,-**

SUDOKU

Sosialurin